# Ósemja um privatiseringar

*Hóast Sambandsflokkurin er ein liberalur flokkur, gongur hann kortini ikki treytaleyst inn fyri privatiseringum av almennum ognum*

EDVARD JOENSEN
*frá landsfundi Sambandsfloksins í Øravík*

Sambandsflokkurin mælir til varisliga sølu av partabrøvum í almennum fyritøkum, sum geva yvirskot. Men tað má ikki privatiserast á økjum, sum geva hall. Til dømis kemur ikki upp á tal, sambært Flemmingi Mikkelsen, at privatisera ella útlisitera Suðuroyarrutuna hjá Strandferðsluni.

Øðrvísi hugsan hevði formaðurin í Unga Sambandinum. Jóan Petur Johannesen segði, at privatiseringar skulu gera tænasturnar betri og bíligari. Hann nevndi, at Strandferðslan skal privatiserast fyri at gera hana betri.

Hann skeyt upp at geva suðringum Smyril saman við einum posa við átta milliónum krónum, so kundu suðringar sjálvir avgera, nær og hvussu Smyril sigldi.

Og hann fekk stuðul frá Edmundi Joensen, sum helt, at tað var ikki heilt ómøguligt, at Suðuroyarsiglingin kundi útlisiterast. Tað vil siga ikki beinleiðis privatiserast, men latast privatum at reka, meðan tað almenna framvegis eigur Smyril.

Eivind Jacobsen, bygdarráðsformaður á Strondum, segði, at tað hann sær sum ein vansa í almennum fyritøkum í dag, er, at fakfeløgini hava ov stórt vald til at siga, hvussu nógv fólk skulu vera til arbeiðis. Men privatisera vit hesi øki, ber til at siga, hvat vit vilja hava og hvørjar tænastur okkum nýtist.



*Eivind Jacobsen, bygdarráðsformaður á Strondum, mælti til varsemi, tá farið verður undir at privatisera. Tað er líka ringt, um tað er ein privatpersónur ella ein almennur stovnur, sum misbrúkar almennar pengar, segði hann*
**Mynd: Edvard Joensen**

Annars helt Eivind Jacobsen ikki, at teir, sum rópa harðast um privatisering, eru teir, sum altíð klára seg best í privatari vinnu. Og har eru sambandsmenn ikki undantiknir, segði Eivind Jacobsen.

Hann vísti á, at tað ofta hevur verið privatiserað ov tilvildarligt. Fólk hava yvirtikið almennar tænastur, men ikki havt førleikar til at reka hesar. Og tá er bara ilt gjørt verri, segði Eivind Jacobsen.

Syrgja vit ikki fyri at betra okkum alla tíðina, kunnu vit gott gloyma alt um privatiseringar. Tí tað ger ongan mun, um tað er landskassin, sum brúkar borgarans pengar illa, ella um tað er ein privatur, sum ger tað.

Michael Jensen, næstformaður í Unga Sambandinum, helt, at tað var gott, at sambandsfólk nú eisini vóru farin at tosa um annað enn ríkisfelagsskapin. Tað var heldur óinteressant, helt hann, altíð bara at hoyra um samband og loysing.

Bent Jákup Hansen, formaður í Føroya Væl, vísti á, at tað var ikki bara lukkan at útlisitera. Hann var fyri nøkrum árum síðan í starvi hjá Bygdarleiðum. Tá vóru allir bussarnir privatir, segði hann. Men í dag er umleið helmingurin fallin aftur til Strandferðsluna. Og tað kundi bara vera ein ábending á, at tað var helst ikki alt so gott við teimum privatu bussunum. Hann heitti á fólk um at hugsa seg væl um, áðrenn bara varð privatisera fyri at liberalisera.

Ivan Johannesen vísti á, at grundin til at privatiserast skal, er, at kapping kemur á ymisk øki. Hann vísti sum dømi á Telefonverkið, sum er gjørt til alment partafelag, og segði, at har var tænastan longu vorðin betri, tí nú vóru fleiri, sum kappaðust á økinum.

Annars gekk í gjøgnum allan vegin, at sambandsfólk fegin vilja privatisera Føroya Banka. Tað skal gerast við at selja partabrøvini.

Lisbeth L. Petersen vísti á, at landsfundurin fyrrapartin hevði jublað yvir samstarv við Javnaðarflokkin. Men so fáa vit trupulleikar við privatiseringum, segði Lisbeth L. Petersen.

Jákup Joensen, fyrrverandi løgtingsmaður, helt ikki, at privatisering av Føroya Banka hevði verið nakar fyrimunur. Í fyrsta lagi hevði tað verið afturstig fyri eigaran, Føroya Landsstýri, sum missir inntøkurnar í longdini til frama fyri løtuvinning við sølu. Eisini hevði tað gjørt tænastuna hjá borgaranum verri, tí bankin tá hevði verið rikin á privatum, handilsligum grundarlagi, sum Jákup Joensen ikki helt fór at vera betri fyri tann einstaka kundan.

Edmund Joensen vísti á, at tað fór ongantíð at verða soleiðis, at vegir og tunnlar fóru at verða privatiseraðir. Hann gjørdi greitt, at Sambandsflokkurin skuldi fara varliga fram við privatiseringum. Tað skal ikki bara privatiserast fyri at privatiserast.

## Samstarv við Javnaðarflokkin gull vert

*Sambandsflokkurin má fyri alt í verðini ikki spæla sær samstarvið við Javnaðarflokkin í fullveldismálinum av hondum, segði formaðurin í Samhaldi á landsfundi Sambandsfloksins*

EDVARD JOENSEN
*frá landsfundi Sambandsfloksins í Øravík*

Tað er gull vert fyri Sambandsflokkin, at samgongan ikki fekk Javnaðarflokkin við í sínar fullveldisætlanir, segði Jóhan Petersen, formaður í sambandsfelagnum Samhald í Eysturoynni.

Hann vísti eisini á, at nú samráðingarnar eru lýstar sum ein landsdystur millum Danmark og Føroyar, eiga samríkisfólk at fara at dekka hin partin betri upp. Tað vil siga, at hvørja ferð, ein fullveldisgrein er í bløðunum, eigur Sambandsflokkurin eisini at koma við eini beinanvegin, segði Jóhan Petersen, formaður í sambandsfelagnum Samhald í Eysturoynni.

## Heldur minking enn loysing

*Heðin Mortensen, løgtingsmaður, heldur, at Sambandsflokkurin heldur eigur at tola eina minking enn loysing*

EDVARD JOENSEN
*frá landsfundi Sambandsfloksins í Øravík*

Sambansflokkurin eigur at melda heilt greitt út í fullveldismálinum. Og útmeldingin skal vera markant. Skal tað kosta flokkinum eina minking, eigur flokkurin at tola tað, heldur enn at geva seg ein tumma til frama fyri fullveldishugsanina, segði Heðin Mortensen.

Hann mælti til, at Sambandsflokkurin býður øðrum flokkum til samstarv um tann partin av føroyskum politikki, sum er ímóti fullveldishugsan samgongunar. Tað verið seg javnaðarfólk, miðflokksfólk og eisini uttanflokkafólk.

Heðin Mortensen helt, at tað møguliga kundi gerast eitt felag við limum úr hesum bólkum, sum hevur til endamáls at upplýsa um tann partin av føroyskum politikki, sum ikki er fyri fullveldishugsjón samgongunar og serliga Tjóðveldisfloksins.



# Sambandsflokkurin ov lítið sjónligur

*Sambandsflokkurin er ov ósjónligur í ríkisfelagsskapsmálinum, helt Jákup Joensen, fyrrverandi løgtingsmaður Sambandsfloksins, á landsfundinum í Øravík um vikuskiftið*

EDVARD JOENSEN
FRÁ LANDSFUNDI SAMBANDSFLOKSINS Í ØRAVÍK

Tað er ikki nóg gott, at politikkur Sambandsfloksins viðvíkjandi ríkisfelagsskapinum ikki er krystalklárur og ikki ber til at misskilja.

Men tað er ein trupulleiki, at flokkurin ikki hevur meldað heilt klárt út. Sum er, kann tað skiljast, ella misskiljast, soleiðis, at flokkurin ikki hevur eina greiða linju, men gongur í bólkum. Og tað ber ikki til, helt Jákup Joensen, fyrrverandi tingmaður Sambandsfloksins.

Orðingin í nýskipanaruppskotinum er ov ógreið, heldur hann, og spyr um tað er tí, at flokkurin ikki torir at fara út við síni hugsan um ríkisfelagsskapin í hesum fullveldistíðum.

Sambandsflokkurin eigur at staðfesta, sum tað eisini stendur í nýskipanaruppskotinum, at Føroyar eru ein sjálvstýrandi tjóð í ríkisfelagsskapinum, segði Jákup Joensen á landsfundi Sambandsfloksins.

Har vóru tó sjálvandi greiðar støður í ritinum, gleddist hann um.

Men at føroyingar skulu yvirtaka mál, um Løgtingið og Fólkatingið taka avgerð um tað, helt hann vera, at flokkurin skýtur egna skútu í »sænk«, tá vit samstundis siga, at vit skulu vera sjálvstýrandi tjóð í ríkisfelagsskapinum.

Hann helt eina grund til hetta vera, at sambandspolitikkarar eru ov lítið eldhugaðir fyri sínum egna nýriti.

Hann helt tað vera ov lítið fingið burtur úr eini ritgerð sum kostaði meira enn 400.000 krónur, tá tað ikki var greiðari orðað enn tað, hann dugdi at fáa burturúr.

»Leggið á annan bógv og snikkið til eitt meira sigandi, meira klárt og týðuligt nýskipanaruppskot«, heitti Jákup Joensen, fyrrverandi løgtingsmaður, á sambandsfólk.

Trygvi F. Guttesen, næstformaður í Sambandsflokkinum, ásannaði, at flokkurin eigur at vera greiðari og má koma við einum boðskapi, sum ikki er til at misskilja.

Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður, segði, at nýskipanaruppskotið er eingin lóg, men eitt samráðingaruppskot. Tí helt hon tað ikki vera so øgiliga farligt, um onkur orðing var eitt sindur leys. Tí tað ber ikki til at fara til samráðingar við eini fastlæstari støðu, segði hon.

Jákup Joensen svaraði, at hann skilti tað eisini sum eitt samráðingaruppskot. Men hann helt tó fast um, at fyri tað skuldi tað vera so greitt orðað, at eingin skuldi kunna misskilja tað.



*Politikkur Sambandsfloksins má ongantíð kunna misskiljast, segði fyrrverandi løgtingsmaður floksins, Jákup Joensen, sum á landsfunsinum fýltist á, at støða floksins til ríkisfelagsskapin kundi misskiljast*

# Samgongan vanvirðir ríkisfelagsskapin

*Tað er ein vanvirðing av ríkisfelagsskapinum at vilja avgreiða eitt 600 ára gamalt samstarv loyniliga upp á tríggjar mánaðar, segði Edmund Joensen á landsfundi Sambandsfloksins um vikuskiftið*

EDVARD JOENSEN
*frá landsfundi Sambandsfloksins í Øravíkk*

Landsstýrið vanvirðir viðurskiftini Danmarkar og Føroya ímillum, segði Edmund Joensen, afturvaldi formaður Sambandsfloksins, tá hann legði upp til orðaskiftið á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum í Øravík um vikuskiftið.

Hann undraðist á, at tað skuldi vera neyðugt, at heili 17 fólk skuldu møta í Keypmannahavn til at áseta ein fundardag. Men grundin var, segði hann, at Landsstýrið ætlaði at halda samráðingarnar um framtíðarstøðu Føroya loyniligar, og at tær skuldu vera lidnar á jóansøku.

Hetta helt sambandsformaðurin vera eina beinleiðis vanvirðing av ríkisfelagsskapinum, sum nú er 600 ára gamal. At hann loyniliga skuldi avgreiðast upp á tríggjar mánaðar.




Men tað býttasta, samgongan gjørdi í hesum máli, segði Edmund Joensen, var at boða frá, at tey komu við eini útrokning, sum segði, hvussu nógv danir skyldaðu Føroyum. Tað hevði sum kunnugt við sær, at danir beinanvegin roknaðu út, hvussu nógv teir hava brúkt upp á føroyingar, og hvat hvør føroyingur í Danmark er verdur.

Edmund Joensen segði, at samgongan hevur ongantíð fingið loyvi frá Føroya fólki at fara undir samráðingar um fullveldi. Hetta er nakað, samgongan bara hevur tikið sær rætt til við at tulka úrslitið av seinasta løgtingsvali, sum var eitt protestval móti bankamálinum. Men tað merkir kortini ikki, at fólkið vil hava fullveldi, segði Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins.

Í góðveðrinum í Suðuroy leygarmorgunin var uppmøtingin væl betri enn fríggjakvøldið. Serliga vóru tað suðringar, sum komnir vóru á fund hendan góða morgun.

Javnstøðulógin er farin at virka innanfloks hjá sambandsfólki. Tá landsfundurin varð tikin upp aftur leygarmorgunin, varð sangurin »Morgunroðin lýsir», sungin. Tvær reglur í sanginum, sum í upprunayrkingini ganga upp á »raskar dreingir« og »fúsar dreingir«, vóru í nýggju útseting Sambandsfloksins umskrivaðar til »gentur,dreingir«.

Hesi fólkini, sum møtt vóru á fundi, fingu frá formanninum at vita, at føroyingar eru ótryggir við politikk samgongunar. Fyrst og fremst tí eingin veit, hvønn politikk samgongan yvirhøvur ætlar at reka.

Tó er greitt, segði Edmund Joensen, at landsstýrið sparir pening á millum øðrum almannaøkinum fyri at brúka teir til at fíggja fullveldispolitikk sín við. Og ikki nokk við tí. Samgongan brúkar so sanniliga eisini almennar pengar upp á at upplýsa um fullveldispolitikkin.

Tað er so galið, segði Edmund Joensen, at útreiðslurnar á fíggjarlógini eru hækkaðar eina millión fyri hvønn yrkadag, hendan samgongan hevur virkað.

Sambandsflokkurin vil hava Heimastýrislógina endurskoðaðað. Men framvegis skulu vit vera í tøttum samstarvi við Danmark, segði Edmund Joensen. Tó skal møguleiki vera fyri at yvirtaka øll mál, sum í dag eru felagsmál. Men yvirtøkurnar skulu vera við gjaldsskyldu. Einki við at vit yvirtaka, og danir gjalda.